# Eg havi altíð verið svakur í motorsúkklum

**Í hesum døgum vitjar búskaparfrøðingurin og sjónvarpsstjórnan, Biker-Jens, í Føroyum**

BIKERJENS
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Eg havi altíð verið púra svakur eftirmotorsúkklum.

Soleiðis sigur Jens Romundstad – betur kendur sum Biker-Jens frá Robinsonsendingini hjá TV3.

Motorsúkklumaðurin vitjar í Føroyum í hesum døgum, og er tað okkara egni Harleyson-maður, Ove Ritter, ið hevur fingið vitjanina í lag.

– Vit hittust faktiskt fyrstu ferð í Kirgisa fyri tveimum árum síðani, sigur Ove Ritter, sum starvast hjá Færøernes Kommando.

Teir vóru báðir í ørindum fyri danska herin í Kirgisia.

Biker-Jens gjørdist kendur um alt ríkið, tá hann var við í Robinsonsendingini, og hevur hann livað av sínum víðagitni síðani. Hann ger nógvar sjónvarpssendingar, hevur m. a. koyrt runt í USA, í Fjareystri og í Australia á motorsúkklu – við sjónvarpsliði í hølunum.

Men nú er hann í Føroyum.

– Føroya hava altíð havt mín áhuga. Eg minnist frá skúlaárunum, at vit høvdu tema um Føroyar í tveir mánaðir, og tá lærdi nógv um Føroyar – og eg siti júst nú og lesi »Den sorte gryde« hjá Williami Heinesen fyri aðru ferð, sigur Biker-Jens.

Sum ungur skrivaði hann saman við eini gentu av Tvøroyri, sum hann kortini hevur mist sambandið við. Men tað kann kanska longu bjargað aftur, tí í gjárkvøldið var hann í Suðuroy, har skipað varð fyri tiltaki saman við TB…?

Jens Romundstad er útbúgvin siviløkonomur í strategi og leiðslu. Eisini hevur hann HD í organisatión. Hann heldur javnan skeið og fyrilestrar, bæði sum Robinsonluttakari, men eisini í virkismenning, har hann nýtir royndirnar frá Robinson sum grundarlag.

– Hesum fái eg rættuliga nógv burturúr. Ofta halda fólk, at tey arbeiða best saman við teimum, sum eru »næstan« líka sum tey, men soleiðis er tað bara ikki. Tú skal júst arbeiða saman við fólkum, ið ikki eru sum tú, tá ført tú útnytta komplimentermongdina – og tá fæst nógv meira burtur úr, sigur Biker-Jens.

Pápi Jens var eisini púra villur í motorsúkklum, og Jens greiðir okkum frá, at hann sum smádrongur gjørdi alt fyri at sleppa at sita aftan fyri hjá pápanum.

– Eg sló grasplenuna, passa lítlusystir, tømdi rusk og alt sum eg kundi fyri at sleppa at sita uppi á – og onkuntíð sjálvur at koyra, sigur hann.

Hann greiðir eisini frá ta einu ferðina, hann var og koyrdi við pápanum. Teir møttu einum rokkarabanda, og Jens visti, at motorsúkklufólk heilsaðust, tá tey møttust, so hann veipaði við ørmunum.

Pápin, sum var ein friðarligur tannlækni, gjørdist ræðslusligin, tá rokkarapresidenturin kom yvir móti honum – men har hendi ikki meira enn tað, enn at rokkarin rætti út strektan arm og segði: »Heil«



*Heima hevur Biker-Jens tvær Harley Davidson. Hesa lænti hann frá Ova Ritter, sum skipar fyri ferð hansara í Føroyum*

*Mynd: »Biker-Jens Kristian«*






Bjarni Djurholm, landsstýrismaður :

# Aftur úr Norðurnorra við íblástri

**– Henda ferðin hevur lært meg, at oljuvinna er nakað, sum tekur tíð, og tað kann eisini vera positivt. Tað ger, at føroysk vinna eisini kann fóta sær og mennast í tí tíðarbilinum og vera við sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður , nú hann júst er komin heimaftur av síni fyrstu ferð í útlandinum sum oljumálaráðharri**

VIÐ ATLANTSFLOGI Í NORÐURNOREGI
*Orð og myndir: Jan Müller*



Føroyska ferðalagið, sum í gjár fór til Norðurnoregs við Atlantsflogi, kom heimaftur í øllum góðum tíðliga fríggjamorgunin. Eftir at hava undirskrivað tann størsta sáttmálan hjá Atlantsflogi nakrantíð varð farið longu leiðina úr Stord til Alta í Norðurnorra. Haðani gekk leiðin til Hammerfest, har landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm og stjórin á Oljufyrisitingini, Sigurd í Jákupsstovu saman við 40 øðrum umboðum úr Føroyum sóu útbyggingina av tí risastóru Snøhvid-verkætlanini.

Hetta er fyrsta uttanlandsferðin hjá Bjarna Djurholm, síðani hann gjørdist landsstýrismaður í oljumálum. Hann er eisini sera fegin um ferðina, sum hann sigur hevur givið sær góða ballast at leggja til brots í sínum nýggja landsstýrissessi.

– Eg havi lært nógv av hesum túrinum, hóast hann bert vardi í eitt samdøgur. Tú kemur í eitt umhvørvi, sum er nógv øðrvísi enn tað tú kennir heimanífrá. Tí dimentiónirnar og tølini eru so nógv størri. Man sær týðuliga, hvussu nógv fyrireiking skal til og hvussu tíðarperspektivið er. Norðmenn raktu við gass í Barentshavinum í 1979 og ikki fyrr enn í 2006 fer tú undir at framleiða gass. Vit tosa tí um eitt tíðarperspektiv uppá 10 til 25 ár, so eg havi lært, at man skal venja seg við tankan , at oljuvinna er nakað, sum tekur tíð.

Bjarni Djurholm heldur fyri, at okkara egni landgrunnur er lítið kannaður í mun til onnur øki, sum ikki koma í rakstur fyrr enn hálvan mansaldur aftaná. Hesin túrurin hevur víst mær, at oljuvinna er ikki nakað, sum hendir frá degi til dags. Tað er ein long prosess, og tað kann eisini vera positivt. Tað ger, at føroysk vinna eisini kann fóta sær og mennast í tí tíðarbilinum og vera við.



*Landsstýrismaðurin í olju- og flogferðslumálum, Bjarni Djurholm og stjórin á Oljufyrisitingini, Sigurð í Jákupsstovu fingu væl burtur úr á áhugaverdu kunningarferðini í Norðurnoregi. Nevndarformaðurin í Atlantsflogi, Kristian Andreassen varð eisini við á ferðini*




*Eitt risafet inn í framtíðina. Hans Hansen, flogskipari og Magni Arge, stjóri vælnøgdir efftir fyrsta túrin til Atla í Norðurnorra*

# Føroysk vinna risafet inn í framtíðina

**Við sáttmálanum millum Atlantsflog og norsku oljuvinnufyritøkuna Aker Stord hevur føroysk vinna tikið eitt risafet inn í eina nýggja og spennandi framtíð**

SÁTTMÁLI
*Jan Müller*



*Eftir undirskrivingina av sáttmálnum handaði Magni Arge, stjóranum á Aker Stord eina eyðkenda gávu úr Føroyum*

Tað var við lógvabrestum, at størsti sáttmálin hjá Atlantsflogi í útlandinum og helst størsti tænastusáttmálin hjá eini føroyskari vinnufyritøku nakrantíð, varð undirskrivaður í suðurnorska oljuvinnubýnum Stord hósmorgunin. Hesin dagurin 1. Apríl 2004 verður heilt givið eitt týðandi vegamót fyri føroyskt vinnulív, sum roynir at fáa fótin fastan í øðrum londum. Sáttmálin millum Atlantsflog og norsku oljuvinnufyritøkuna Aker Stord hevur eitt virði, sum í mesta lagi er uppá góðar 100 mill. kr. Atlantsflog fekk henda sáttmálan í harðari kapping við fleiri aðrar fyritøkur. Tað snýr seg um at flyta 35.000 norskar oljuarbeiðarar úr Suðurnoregi til Alta og víðari til Hammerfest í Norðurnorra komandi tvey árini. Fyrsti túrurin verður miðskeiðis í hesum mánaðinum.

Við á hesum fyrsta túrinum úr Føroyum til Norðurnoregs vóru ummleið 40 umboð úr Føroyum og haraftrat umboð fyri Aker Stord og so Statoil, sum stendur fyri allari útbyggingini av Snøhvidgassfeltinum.

Á samkomu eftir undirskrivingina segði stjórin hjá Aker Stord m.a., at teir vóru sera fegnir um at hava fingið samstarv við Atlantsflog og vónaði hann, at hetta samstarv eisini kundi verða víðkað til aðrar fyritøkur. Hann nevndi í hesum sambandi góða samstarvið teir høvdu havt við Pam Offshore í Føroyum, sum m.a. hevur latið teimum sveisarar. Hann helt fyri, at nýggja flutningsleiðin hjjá Atlantsflog kann hava við sær, at norðmenn lættari og bíligari kunnu koma til Føroya at halda summarfrí. Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi fegnaðist somuleiðis um avtaluna og segði, at øll starvsfólkini hjá flogfelagnum fóru at gera sítt ítarsta til tess at kunna liva upp til hesa spennandi og stóru avbjóðing. Hann vónaði eisini, at hetta bert kundi vera byrjanin og segði, at kundi sáttmálin hjá Atlantsflog vera ein lopfjøl fyri aðrar føroyskar fyritøkur at útvega sær uppgávur í norskari oljuvinnu, so varð nógv vunnið.

Tað er norska oljufelagið, Statoil, sum stendur fyri allar Snøhvidverkætlanini, ið fer at kosta 45 milliardir kr. Tað er neyvan heldur nøkur loyna, at tað hevur medvirkað til, at Atlantsflog hevur fingið avtaluna, at tað nettupp er Statoil, sum er fyristøðufelag. Statoil telist millum tey mest virknu útlendsku oljufeløgini á føroyska landgrunninum og er tað felagið, sum hevur gjørt heilt greitt, at tað ætlar sær at halda fram við at gera íløgur her.

Sambart loyvisreglunum millum føroyskar myndugleikar og útlendsku oljufeløgini, binda hesi seg eisini til at geva føroyskum fyritøkum eina hjálpandi hond, tá tað ræður um at fáa fótin fastan í oljuvinnu aðrastaðni eisini. Men tað er so fyrst og fremst kappingarførinum hjá Atlantsflogi og tí stóra arbeiði fólkini, ið hava arbeitt við sáttmálanum, hava gjørt, fyri at takka, at sátmálin kom í hús. At flogskiparin Hans Hansen haraftrat hevur drúgvar royndir at flúgva í norskum loftrúmi telur so eisini tann rætta vegin.

Lesið frásøgn frá hesum søguliga og áhugaverda túri í bløðunum í komandi viku.